Beinta Løwe Jacobsen
løgtingsmaður

Nr. 23/2020

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um túratalið hjá Rituni, settur landsstýrismanninum við fíggjarmálum, Jørgeni Niclasen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Hví siglir Ritan ikki tilkallitúr kl. 18.30 til Fugloyar, men bara til Svínoyar?
2. Tá fíggjarlógin fyri 2020 varð samtykt, vóru sekshundraðtúsund krónur settar av til at økja um túratalið út í Fugloynna og Svínoynna. Hvat er hesin peningur brúktur til?
3. Hvussu nógv er túratalið til Svínoynna økt?
4. Hvussu nógv er túratalið til Fugloynna økt?

Viðmerkingar:
Fugloyingar hava gjørt vart við, at tey kenna seg vera fyri vanbýti, nú Ritan bara siglir tilkallitúr kl. 18.30 til Svínoyar, men ikki til Fugloyar. Løgtingið hevur eisini økt játtanina til júst hesa farleiðina fyri at økja um túratalið. Fyri at fáa greiðu á hesum málinum verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 23. september 2020

Beinta Løwe Jacobsen